funnu vit útav, at tá ið vit ferðaðust í Gamla Kingston og vanligu støðunum, so blivu vit meir ella minni álopnir, har tey vildu hava ein part av okkara ríkidømi við at bidda ella bjóða seg framm at gera eina tænastu. Her høvdu vit nakrar óbehagiligar støður.

Síðan gekk leiðin langt upp í fjøllini, har vit fyrst vitjaðu staðið, har tað kenda Blue Mountain Coffee verður gjørt. Her keyptu vit hvør sín pakka. Tað stuttliga við hesi vitjan var at maðurin, sum gjørdi kaffi, fylgdi akkurát við í Champions League-fótbóltinum á netinum, tá ið vit vitjaðu har. Hesin maðurin var sera áhugaður í fótbólti, og sum tann einasti í landinum vit tosaðu við, kendi um Føroyar. Her kundi Hanus reypa eitt sindur, har hann vísti ymiskt um EB/Streym og um dystin móti Manchester City, sum hann varð hugtikin av. So meðan vit traðka í bilin áveg avstað aftur, hoyra vit við einari jamaikiskari dialekt: »Go EB/Streymur«.

Eftir hetta fóru vit til eitt stað, ið kallast Strawberry Hill. Tað er eitt stað, sum nógvar mega stjørnir og kend fólk hava vitjað ferð aftaná ferð, her koma tey at slappa av. Á veggunum sóu vit myndir av stjørnunum, tá ið tey hava vitjað staðið. Hetta var avbera lekkurt stað, sum liggur fleiri 100 metrar yvir Kingston. Her kanst tú við frískari tunnari luft, sum als ikki er at finna niðri í tí rokaliga býnum, taka tær av løttum við góða útsýninum.



*Glað jamaikansk børn saman við Hanusi Eliasen*

### Fátækur skúli

Aftaná var tað vorðið so seint, at vit gjørdust samdir um at best var bara at leggja leiðina heim, so man kundi leggja seg at sova.

So í dag fóru vit út at ganga ein túr í Port Royal, har vit møttu ymiskum fólki, m.a. tosaðu vit við ein fiskimann og har tóku vit myndir av, hvussu tey viðgjørdu fisk. Vit gingu eisini framvið einum barnaskúla, sum var eina vitjan verd. Tann fyrsta vit møta er skúlastjóran, sum segði, at vit máttu hava serloyvi at koma inn, men eftir at hava tosað við hann eina løtu, so loyvdi hann okkum inn. Vit tóku síðani nakrar myndir, har børnini tyktust sera "uppgearaði" yvir, at 2 hvítir komu at vitja teirra skúla. Áðrenn vit fóru frá skúlanum, so fingu vit aftur eitt prát við skúlastjóran. Vit lovaðu at senda ymiskar myndir frá okkara lokala barnaskúla. Vit spurdu, hvussu tað var viðvíkjandi tí fíggjarliga. Til tað svaraði hann, at skúlin var sera illa fyri. Vit lovaðu tí at senda ein bólt ella okkurt líknandi til henda skúla. Um nakar er áhugaður at gera tað sama, so er hetta addressan: Port Royal Primary & Infant School, Kingston 1, Jamaika

### Víari til Kuba

Eftir hesa vitjan fóru vit líka ein túr á strondina, har ein lokalur drongur kom til okkum og bjóðaði seg til at sigla okkum til eina oyggj, sum tók 15 minuttir at sigla til, fyri ein bíligan penga. Vit tóku av, so allur seinnaparturin gekk við svimjing og kaving. Hetta má upplivast, sera lekkurt.

Nú sita vit á staðnum, har vit yvirnátta. Og í morgin árini kl. 8 flúgva vit víðari til Kuba.

Eisini hava vit gjørt ein myspace profil til endamálið og hann er á: www.myspace.com/hanusogatli

# O'Neill er góður við ferðafólk

**Føddur 6. mars 1976**



Tað er ymiskt, hvussu fólki í Jamaika tók ímóti okkum. Nøkur vóru sera ágangandi, meðan onnur sóu ein møguleika í at fáa okkurt munagott burtur úr, sum t. d. við at selja ella bjóða okkum okkurt, og hesi vóru tí blíð og fryntlig.

Vit møttu O'Neill á keiini í Port Royal dagin eftir, at vit komu til Jamaika. Honum dámar væl turistar og bjóðaði seg fram at vísa okkum tey áhugaverdu støðini í Jamaika. Hóast hann er væl fyri í mun til onnur, so eigur hann ikki nógv. Bilurin, hann koyrdi við, hevði hann lænt frá pápanum. O'Neill er ikki væl fyri fakliga, tað løgdu vit fleiri ferðir merki til, tí tá ið hann bleiv spurdur um einkul roknistykkir og stavilsi, hevði hann stórar trupulleikar. Vit fingu eina góða samtalu um, hvussu hann heldur jól í Jamaika. Hann segði, at hansara familja samlaðist í jóladøgunum (tveir dagar) í onkrum størri høli, har tey eta svínakjøt, syngja sálmar og býta gávur sínamillum. Eitt, sum O'Neill legði stóran dent á, var at tey halda jól, tí Jesus varð føddur, og at Jesus var deyður fyri okkara syndir. Hóast aðrir trúðarbólkar og serliga Rastafari, sum hevur sterkar røtur í Jamaika, so hevur O'Neill tí vanligu kristnu læruna, sum vit kenna her í Føroyum, og tí minna hansara jól nógv um okkara.